# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Bendix Bærentsen fer til gravar úr Vestmanna kirkju týsdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Bendix, kunnu lata eina gávu til Eldrasambýlið í Vestmanna. Konto í Eik.

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at okkara góði pápi, verpápi og abbi

**Bendix Bærentsen**
Vestmanna

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið 24. august 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju týsdagin 28. august kl 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Masa og Uffe**

Tey, ið vilja minnast Bendix, kunnu lata eina gávu til eldrasambýlið í Vestmanna konta í Eik

## Skipsføraraprógv

Tann 22. juni tók Brian Anthoniussen prógv sum skipsførari á Vinnuháskúlanum í Havn.

## Dagurin

**28. august. Augustinus,** deyður ár 430. Føddur í Tagaste í Norðurafrika. Eftir mongum ymiskum vegum gjørdist hann kristin og endaði biskupur í Hippo í Norðurafriku. Hann doyði tá ið vandalakongurin Geiserik kringsetti staðin. Augustin var mætasti kiskjulærarin í fornkirkjuni og hevði tær komandi øldirnar mikla ávirkan á kristna heimspeki og guðfrøði.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Føroyingur framtíð sum skemtari í Norra




Leygarkvøldið luttók fimtan ára gamli Jógvan Gunnarsson í stóra Stand up festivlinum í Oslo, har fleiri av kendastu norsku skemtarunum eisini vóru staddir.

Orsøkin til luttøkuna hjá Jógvani, sum býr á oynni Bømlo í Norra, var at hann meldaði seg til eina skemtarakapping gjøgnum stóra norska dagblaðið VG, og mikudagin í síðstu viku ringdu tey frá VG og søgdu, at hann hevði vunnið kappingina, tí dómsnevndin metti, at hann hevði ta bestu framførsluna.

VG skrivaði, at Jógvan varð kosin vinnari tí hann dugir sera væl at føra seg fram og at herma eftir kendum fólkum, og hann er so róligur og tryggur á pallinum, sum er heilt óvanligt fyri ein so ungan persón.

Í hesum sambandi var Jógvan boðin til Oslo leygarkvøldið, har hann var á pallinum á Stand Up Festivalinum í Oslo. Kendasti skemtarin í Norra, Jon Schau, sum eisini sat í dómsnevndini fyri VG, segði eftir at Jógvan hevði framført í Oslo "Ikke bare har han en fremtid som standup-komiker, men standup har en fremtid i Norge kanskje mye på grunn av ham". Jon Schau er norska svarið upp á Amin Jensen í Danmark.

Jógvan byrjaði sína karieru sum skemtari fyri tveimum árum síðan, tá hann framførdi í skúlanum. Síðan hevur hann eisini framført til brúdleyp og aðrar veitslur í heimbýnum Bremnes á oynni Bømlo. Hetta var nakað heilt serligt fyri hann at framføra á Stand up festivalini í Olso fyri fleiri hundrað fólkum.

Jógvan gongur í løtuni í 10. flokki, og hann kundi hugsað sær at farið á framhaldsskúla við sjónleiki sum sergrein.

Jógvan er føroyingur, foreldrini eru Lis-Maria og Jørgin Gunnarsson úr Havn. Jógvan er yngstur av seks systkjum. Familjan hevur búð á Bømlo síðan 1994.

Grein um Jógvan og videoklipp av framførsluni eru at síggja á www.vg.no

**mg**



*Jógvan varð kosin vinnari, tí hann dugir sera væl at føra seg fram og at herma. Hann er róligur og tryggur á pallinum, sum er heilt óvanligt fyri ein so ungan persón, skrivar VG*